


Her liggja teir við bryggju í New Foundlandi og taka útgerð



Her eru teir inni. Uttast til vinstru er Oluf Vang, beiggi Jákup Andreas. Uttast til høgru Dagfinn Petersen. Maðurin í keppi man vera Jákup Høj. Honum sigldi Tórhallur eisini saman við



Her er lagið gott umborð. Frá vinstru eru: Tórur Arge, Jákup Høj, sum sigldi nógv ár við Jákup Andrias, og sum var fastur avhøvdari, Sámal Knudsen og Eilif Jacobsen



Hesa myndina frá 1957 fingu vit beint nú frá Johan Kass. Hon stavar frá, at Atlantsfarið og Austerlitz eru inn í Bonavista í New Foundlandi. Uttast til høgru er Johan sjálvur og uttast til vinstru Eiler Jacobsen. Tað er bert ein dagur millum teir. Teir eru føddir ávikavist 29. og 30. juli 1930. Undir liðini á Johan situr pápi hansara Bartal, ein av okkara sera kendu skiparum. Í aftara rað er annars ein prestur, og frammanfyri umboðsmaður fyri Russel, sum var agentur hjá skipunum, saman við húshaldirsku

at nú viðraði at fara út aftur, var Vesturhavið Blíða á veg til markna.

Annars minnist Hargarð ein tilburð, tá tað eisini kundi gingið galið. Teir stóðu vanliga 10 mans og egndu í øðrum skúrinum. Einaferð allir 10 vóru til kaffi, kom eitt slíkt óløgi, sum sendi fremru hurðina í egningarskúrinum aftur gjøgnum allan skúrin. Her hevur nógv staðið á. Hevði nakar verið har tá, var ikki lætt at vita, hvussu endin hevði verið.

## Menn komu undan

Inntøkurnar vóru ikki framúr í mun til arbeiðið, men tó góðar í mun til, hvat ið kundi fáast við slupp. Vanliga varð roknað við, at ein "normal" ársinntøka við línuskipi lá um kr. 12.000. Tað var nógv umtalað, tá ið manningin á Columbus nakað inni í 60-unum hevði havt eina ársinntøku uppá heilar kr. 17.000! Hetta var fyri at vera hvønn túr við.

Teir flestu av manningini á Vesturhavinum Blíða vóru ungir menn. Og hesir fingu ein annan fyrimun vegna tess, at reiðaríið eisini hevði timburhandil. Tá kundi manningin keypa byggitilfar frá reiðarínum og gjalda tað av hýruni, so hvørt hon varð forvunnin. Tá kundi tað bera til skjótt at gerast skuldarleysur, og hevði hetta sjálvsagt eisini sín stóra týdning.

## Jákup Andreas - framúr sum skipari og menniskja

Ein sum kom at sigla nógv saman við Jákup Andreasi, og sum kom at kenna hann sera væl, er Sámal Knudsen av Glyvrum.

Sámal byrjaði sum kokkadrongur við Vesturhavinum Blíða. Seinni gjørdist hann dekkari. Hann var av inn í millum, men kom so eisini at sigla saman við Jákup Andreasi við Columbus, har hann eisini hevur verið maskinmaður. Teir komu eisini at hava nógv saman, eftir at Sámal var givin at sigla, og lagnan vildi tað so, at Sámal helt í hondini á Jákup Andreasi, tá ið hann doyði í 1980 bert 65 ára gamal.

Sámal hevur bert alt tað besta at bera sínum gamla skipara - bæði sum skipara og menniskja. Eitt serkenni fyri hann var, at hann føldi eina serliga ábyrgd fyri teimum ungu. Hann bæði vildi verja teir, samstundis sum hann vildi venja teir til menn. Hansara umsorgan kom ikki minst til sjóndar, tá komið var inn í fremmanda havn, har freistingar kundu lúra. Tá hevði hann serligt eyga við teimum, so teir skuldu koma heilskapaðir umborð aftur. Tað var dømi um, at hann stóð á brúnni alla tíðina skipið lá inni av umsorgan fyri manningini.

Jákup Andreas var rokskipari, men hann hugsaði ikki bert um rúgvuna, sum annars onkuntíð hevur verið eyðkenni fyri føroyingar. Hann fylgdi væl við arbeiðinum umborð. Hann fór í lastina at tryggja sær, at alt var í lagi við hagreiðingini av fiskinum. Hetta gjørdi hann serliga fyrst á túrinum. Tí, sum hann segði, "grundarlagið skuldi jú vera í ordan". Og tað var tað eisini. Tað var ikki fyri einki, at hann fleiri ár uppí slag fekk heiðursmerki frá landsstýrinum ikki bert fyri stóra veiðu, men eisini fyri væl hagreidda veiðu.

## Royndi eisini nýggjar møguleikar

Jákup Andreas hevði eisini hugflog og vildi royna nýggjar møguleikar. Hesum greiðir Herman Mørkøre frá. Herman var annars við á sjálvari ferðini hjá Vesturhavinum Blíða heim til Føroya í 1956. Hann hevði siglt við norðmonnum í fleiri ár og gekk á skiparaskúla í Noregi. Hann kom tískil heim til Føroya í jólaferiu við nýggja skipinum.

Herman greiðir frá, at Jákup Andreas á heysti 1958 tók tað tá óhoyrda stig at fara til Grønlands á saltfiskaveiðu. Teir fóru avstað 2. oktober. Hetta varð roknað at vera slíkur ørskapur, at stórur partur av manningini ikki hættaði sær við. Teir fiskaðu út fyri Arsuk í Suðurgrønlandi, og seks vikur seinni komu teir heim við fullari last. Seinni gjørdist hetta ein av møguleikunum hjá línuskipunum.

Í seinnu árum keypti hann Vørðuna, sum fekk navnið Vesturhavið. Hetta var seinasta skip yvirhøvur, sum hevur verið í sjálvdrátti. T.v.s. at hvør maður fekk løn í mun til fiskatalið, hann dróg á dekkið. Hesin túrur var 23.5.-15.9 1975 ella 114 dagar. Og lønin pr. fisk var kr. 2,13.

**Manningin 1. túrin hjá "Vesturhavinum Blíða" 5.1.-15.3 1957**

| | | |
|---|---|---|
| **Skipari** | Jacob Andreas Vang | Glyvrar |
| **1. bestim.** | Joen Jacob Johannesen | Søldafjørð |
| **2. bestim.** | Sjúrður Nielsen | Saltangará |
| **1. motorp.** | Hallgrim Poulsen | Strendur |
| **2.-** | Theodor Højgaard | Toftir |
| **kokkur** | Ivan Gaardbo | Toftir |
| **dekkari** | Oluf Vang | Glyvrar |
| - | Jógvan Weihe | Søldafjørð |
| - | Martin Magnussen | Glyvrar |
| - | Hermod Magnussen | - |
| - | Karl Jacobsen | - |
| - | Amon Djurhuus | Søldafjørð |
| - | Viljormur Nielsen | Saltangará |
| - | Hans Marius Nielsen | - |
| - | Hilmar Jacobsen | Syðrugøtu |
| - | Hans David Gregersen | - |
| - | Asbjørn Olsen | - |
| - | Hanus Olsen | Oyrabakki |
| - | Edvard Johannesen | - |
| - | Reinhard Rasmussen | Norðskáli |
| - | Petur Ellingsgaard | Eiði |
| - | Jacob Høj | Strendur |
| - | Óli Finnson | Lamba |

**Næstu ferð**

Í komandi og seinasta parti verður drigið saman um, og tað verða fleiri frásagnir frá Tórhalli. Millum annað um, tá ið hann bað ein mann ikki doyggja, fyrr enn teir høvdu lagt skipið at!